**Millum**

**Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya**

**er henda semja gjørd um dagrøktararnar**

**§ 1**

Lønin hækkar:

| | |
|---|---|
| • 1. oktober 2007 | 2,20 % |
| • 1. oktober 2008 | 2,30 % |
| • 1. oktober 2009 | 2,20 % |

**§ 2**

Eftirlønin hækkar:

| | |
|---|---|
| • 1. oktober 2006 | 12,15 % |
| • 1. oktober 2007 | 13,15 % |
| • 1. oktober 2008 | 14,00 % |
| • 1. oktober 2009 | 15,00 % |

**§ 3**

Í sáttmálanum verða hesar broytingar gjørdar:

§ 2, *stk. 9* verður orðað soleiðis:
Virkandi formaður í felagnum hevur altíð rætt til at fáa farloyvi uttan løn, og hevur stovnurin skyldu at hava starv til viðkomandi, tá ið formanstíðin er úti.

§ 3 verður orðað soleiðis:
*Stk. 3.* Arbeiðsgevarin sendir samstundis felagnum avrit av setanarskrivinum, fyri limir í Starvsmannafelagnum.
Verandi *Stk. 3* verður til *Stk. 4.*

Í § 5 verður nýtt stk. 4 soljóðandi:
Kommunan rindar munin millum útgjaldið frá tí almenna og tann skattskylduga partin av lønini hjá dagrøktaranum.

§ 15 verður orðað soleiðis:
Kommunan kann áleggja dagrøktarnum, ið hava eina samanseting av børnum, sum gevur eitt ansingarprosent, sum er minni enn útgoldna lønin, at taka onnur børn í ansing, svarandi til lønina áljóðandi 100% ella 75%, uttan eyka kostnað fyri kommununa.
*Stk. 2.* Samsýning fyri 6 gestarøktir í einum 8 viku tíðarskeiði, er íroknað lønini hjá einum fulltíðarløntum dagrøktara. Treytin fyri allari gestarøkt er, at samlaða barnatalið ongantíð fer upp um 6 børn. Hevur dagrøktari 4 børn undir 3 ár í ansing, kann hesin bert taka 1 barn undir 3 ár í gestarøkt. Fyri parttíðarløntar dagrøktarar er sama regla galdandi, tó so at samlaða barnatalið ongantíð fer upp um 4 børn. Gjørt verður upp fyri 8 vikur í senn.

*Stk. 3.* Um talið av børnum í gestarøkt hjá einum dagrøktara í einum 8 viku tíðarskeiði fer upp um ásetingarnar í stk. 2, so verður goldin upphædd, sum verður roknað lutfalsliga í mun til lønina hjá viðkomandi dagrøktara
*Stk. 4.* Ansing av børnum í spælistovu verður bert roknað sum gestarøkt, um samlaða barnatalið í spælistovuni svarar til meira enn 6 børn fyri hvønn fulltíðarløntan dagrøktara/starvsfólk og 5 børn fyri hvønn parttíðarløntan dagrøktara/starvsfólk, sum hendan dagin eru til arbeiðis í spælistovuni.
Samsýningin verður býtt millum teir dagrøktarar, sum hendan dagin eru til arbeiðis í spælistovuni. Samsýningin verður roknað út sambært áseting í § 14, stk.2.
*Stk. 5.* Eftirløn verður ikki goldin av samsýning fyri gestarøkt, sum gongur út yvir 100% ansing.

§ 23 verður orðað soleiðis:
*Stk. 1.* Hesin sáttmáli kemur í gildi tann 1. oktober 2006. Báðir partar kunnu siga sáttmálan upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til tann 1. oktober 2010.
Í sambandi við at siga sáttmálan upp, kann annar parturin krevja, at samráðingarnar byrja innan ein mánað eftir, at krøv eru send mótpartinum. Tó kann parturin í fyrsta lagi krevja, at samráðingarnar byrja um at endurnýggja sáttmálan 6 mánaðir áðrenn hann fer úr gildi.
*Stk. 2.* Partarnir eru samdir um 1. oktober 2008 at umrøða § 36 í sáttmálanum, um munandi broytingar, ið hava ávirkan á lønarlagið, eru farnar fram í samfelagnum.
Henda áseting kann ikki føra til, at sáttmálin verður uppsagdur í sáttmálaskeiðnum.

Tórshavn, hin 28. februar 2007

| **Starvsmannafelagið** | **Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya** |
| --- | --- |
| Gunnleivur Dalsgarð / Anna Johannesen | Heðin Mortensen / Anita Fuglø |
| Selma Ellingsgaard | Karl A. Olsen |
| Niels á Reynatúgvu | |
| Eimi Fossdalsá | |
| John Kjær | |